**Marjun Syderbø Kjelnæs**

Eitt havnalag er sjórok, saltskúm, fiskaroykur, oljuos, “farvæl og ansa eftir tær,” “takk og lov tú ert heima aftur,” fullfermdir familjubilar, sjóverkstablettir. Her eru trukkarnir, slógvið, grótkastið, børnini sum forvitin eygleiða raksturin, svartir hvalakroppar, reypandi fólk við trillubørum. Og so fyrsti fríggingartúrurin við bankandi hjarta. Her er tað at frumevnini hittast og kína hvør øðrum. Her er lívið og deyðin og øll gloppini ímillum.

Einaferð rýmdu hálvtrýss túsund fólk úr Gøteborg um mánaðin, tað sama sum, at alt føroyafólk fór avstað í einum, so lætt at strúka burtur eina heila tjóð, nøkur skip, nøkur farvæl, táratrappurnar tómar, ongin at gráta við ella um, einans træðrir, ósjónligir, skyggjandi í sólarljósinum, inntil teir slitna við einum hørmum smelli, tá ið sálirnar lenda hinumegin, tá ið tær sjúnka, og lata tað farna søkka í gloymsku. Kanska tóku tey ein neva av mold við sær, ella smásteinar at hava í lummanum, at minna seg á. Kanska er ein heimstaður bara ein loftbrá. Mold hevur onki mál, ongan átrúnað, ella í sær allar tungur og alla trúgv.

Øll droyma um at síggja havið, vónin er har, ein vegur burtur. Ongin ynskir sær at flyta so langt upp á turt, at havið ikki hómast longur, ongin vil verða innilæstur mitt í einum heimsparti, eins og okkurt neyðardýr í Nebraska. Og eru tey fangaði har, so tyrpast tey um vøtn og áir, lívæðrar sum binda tey føst í upphavið, tey slota eftir hjartasláttrinum í áartutlinum, ugga seg við tí.

All rights reserved
© Marjun Syderbø Kjelnæs, 2017